tíðindablaðið

# sosialurin

Nr. 169 Mikudagur 6. september 1995 | 69. árgangur | Krónur 7,00

**LANDSLIÐIÐ:**

## Julian og Magni eru uttanfyri við skaða – Øssur ivasamur

*Bæði Harley Bertholdsen og Allan Mørkøre úr KÍ vórðu gjár bidnir um at koma aftrat í hópin, tí skaðar forða Julian og Magna at spæla*

**Ítróttur á síðu 11, 12, 13 & 14**

**Í Klaksvík:**

# Neyðarróp eftir sjúkrasystrum

*– Tað er javnan, vit mugu ringja til Danmarkar fyri at fáa sjúkrasystrar, sigur Andrea Løwe Jacobsen, fyristøðukvinna á Klaksvíkar Sjúkrahúsi* **síða 3**





## Brúkiligur fiskiskapur eystanfyri

**Síða 3**

## Kvinnan, ið skal leika Barbara væl umtókt

**Baksíðan**

**Suðuroyingar í Aberdeen:**

# Okur eiga oljuna

*Fleiri suðuroyingar eru á oljumessu í Aberdeen, m.a. umboð fyri havnarmyndugleikarnar í oynni. Teir vænta sær nógv av eini komandi oljuvinnu í Føroyum. Jan Müller skrivar úr Aberdeen* **síðurnar 6–7**

*Suðuroyingar leggja til brots í Aberdeen:*

# »Okur eiga oljuna«

Tað eru ikki bara virki, fyritøkur og almennir stovnar, sum vilja stóru altjóða oljumessuna í Aberdeen í hesum døgum. Føroyskar kommmunur halda seg ikki aftur og vilja so avgjørt ikki vera eftirbátar, tá tað snýr seg um at vera við í »oljuævintýrinum«.

Ikki færri enn seks føroyskar kommunur eru við á oljuframsýningini og ráðstevnuni »Offshore Europe 95«. Her er landsins størsta kommuna, við sjálvum høvuðsstaðnum í miðdeplinum, her er eisini landsins næststørsta kommuna, Klaksvíkin, og triðstørsta við, Runavík.

Men suðuroyingar ætla sær ikki at standa og hyggja at, meðan teir norðafjørðs fara avstað við arbeiðsplássunum og ágóðanum frá komandi oljuvirksemi, og tí hava bæði vágbingar og tvøramenn tikið saman hendur og royna at gera vart við seg her í Aberdeen.

– Eg haldi tað er heilt natúrligt, at vit samstarva her í Suðuroynni, ikki minst tá talan er um eina framtíðar oljuvinnu. Vit liggja jú næstir oljukeldunum, sum longu eru funnar við Hetlandsrennuna, og nógv bendir á, at verður olja funnin á føroyskum øki, so verður Suðuroyggin at liggja næst við oljukeldurnar, sigur borgarstjórin á Tvøroyri, Páll Vang, við Tíðindablaðið Sosialin her í Aberdeen.

Hann er saman við øðrum umboðum fyri Tvøroyrar Kommunu á oljuframsýningini í Aberdeen. Her royna tey at gera vart við Suðuroynna og hvørjar umstøður er á Tvøroyri til at taka ímóti eini komandi oljuvinnu.

**Drelnes væleginað**

Hann sigur, at Drelnes er vælegnað til at taka ímóti oljuvinnuni. Har er gott pláss og møguleikarnir eru eisini at útbyggja økið enn meira fyri at nøkta tørvinum hjá eini komandi frálandavinnu.

Skuldi Drelnes endað sum framtíðar útgerðarpláss ella líknandi hjá frálandavinnuni, so má sigast, at Drelnes hevur roynt hvørt av sínum. Her var frá fyrstan tíð kolahavn, síðani kom saltið og so samferðslan. Nú kemur so oljan møguliga afturat.

Páll Vang heldur tað vera natúrligt hjá oljufeløgunum, sum helst fara at arbeiða í økinum sunnan fyri at brúka facilitetir í Suðuroynni. Hann heldur, at Vágur og Tvøroyri eiga at leggja eitt samstarv til rættis, soleiðis at báðar kommunurnar í felag kunnu ganga oljufeløgunum mest á móti.


Jan Müller
úr Aberdeen

– Eg veit væl, at Havnin á nógvum økjum betur kann nøkta tørv og ynski hjá oljufeløgunum, og tí kann tað vera ein loysn at hava umsitingina í høvuðsstaðnum og síðani brúka bæði Vág og Tvøroyri til goymslupláss. Men hetta verða oljufeløgini, sum koma at arbeiða her, sjálvandi at avgera. Vit kunnu so bara gera okkara besta fyri at sannføra tey um, at vit eiga umstøður.

Páll Vang vísir á, at meðan vágbingar hava eina skipasmiðju, so hava teir á Tvøroyri góðar facilitetir á Drelnesi, teir hava sjúkrahús og annað.

Tað eru tó ikki bert tær stóru kommunurnar í landinum, sum eru við á oljuframsýningini í Aberdeen. Onkrar minni kommunur eru eisini við. Kommunurnar eru ikki partur av sjálvum tí føroyska básinum, men tær hava fingið gjørt ymiskt tilfar, sum verður at síggja á føroyska básinum.

Felags fyri allar kommunurnar er, at tær vilja vera við í eini komandi oljuvinnu.

Tær royna so hvør í sínum lagi at reklamera fyri sær og sínum. Í brosjuruni, sum tvøramenn hava gjørt, verður gjørt vart við, at Suðuroyggin er næsta oyggin til landssynningsmarkið. Hetta er júst tað økið, sum føroyingar og bretar stríðast um og har bretar longu hava funnið stórar oljukeldur.


*Tvøråmenn halda, at Drelnes er væl egnað at hýsa oljuvinnu. Her ber eisini til at byggja út*


*Páll Vang, býráðsformaður á Tvøroyri – Eg haldi, at Suðuroyggin hevur nógv at bjóða eini komandi oljuvinnu, men helst fara oljufeløgini bæði at brúka facilitetir her og aðrastaðni, kanska serstakliga í Havnini*


*Vágbingar hava gjørt nógv tilfar til oljumessuna í Aberdeen. Teir halda Våg vera væl egnaða at taka ímóti eini komandi avbjóðing frá oljuvinnuni*


## MCAFEE Anti-Virus




McAfee VirusScan er sera lætt at nýta. VirusScan finnur og burturbeinur kend og nýggj telduvirus áðrenn tey gera um seg. VirusScan verður javnan endurnýggja og fæst til DOS, Windows og OS/2

Vit senda um alt landið. Prísir frá kr. 487,- (v/mvg)

Adaptive Design, 690 Oyndarfjørður, Tlf.44872, Fax.44873



## Skrivstovustarv á Landsskrivstovuni

Á Landsskrivstovuni er eitt starv sum skrivstovufólk leyst at søkja til setan frá 1. oktober 1995 ella skjótast gjørligt.

Starvið umfatar skriving fyri deildir og annað vanligt skrivstovuarbeiði.

Útbúgving í skrivstovuyrkinum og góður kunnleiki í føroyskum eru fyrimunir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið og verður lønt í 9. lønarflokki í hesum sáttmála, um viðkomandi hevur skrivstovuutbúgving, annars í 7. lønarflokki.

Umsóknir við møguligum prógvum og øðrum viðkomandi skjølum skulu vera Landsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi friggjadagin 15. september 1995 kl. 16.00.

**Landsskrivstovan**
Tinganes
Postboks 64
110 Tórshavn




*Vit siggja hvussu nær markinum Conival er. BP hevur enn ikki viljað givið nakrar upplýsingar um hesa keldunu, men bara tað at hon longu hevur fingið navn og er komin á kort bendir á, at her kann vera talan um eina stóra oljukeldu eins og Foinaven og Schihallion í grannalagnum. Krossurin sunnan fyri Conival er staðið, har Amerada Hess fer undir eina boring í næstum*

# Gassolja komin í blýfría bensinið

*Eitt óhapp hendi, tá oljubáturin Magn pumpaði blýfrítt bensin í bensintangan á Tvøroyri. Eitt sløð av gassolju var eftir í tangunum og var blandað upp í bensinið*

Herfyri hendi óhapp, tá oljubáturin Magn hjá Shell, pumpaði blýfrítt bensin í tangarnar, sum varð flutt í bensintangan á Tvøroyri.

Hjarnar Djurhuus, stjóri á Shell, sigur við Sosialin, at teir vóru varugir við, at alt ikki ruggaði rætt har suðuri, tí smyrjioljan vaks í bilum, sum nýta blýfrítt bensin. Vanliga eigur smyrjioljan at minka. Tí varð kanning sett í verk, fyri at vita, hvør orsøkin var.

Kanningin vísti, at nakað av gassolju var komið í blýfría bensinið.

Oljufeløgini Shell og Statoil samstarva um stóra bensintangan á Tvøroyri. Bæði feløgini fylla í tangarnar.

Hjarnar Djurhuus sigur, at tað var Shell, sum hevði koyrt blýfría bensinið í tangan á Tvøroyri. Enn er endaliga úrslitið av kanningini ikki liðug, men helst hevur nakað av gassolju verið eftir í tangunum á Magn, áðrenn bensinið var pumpað umborð.

Vanliga verður ansað væl eftir, at tangarnir eru tómir, áðrenn fylt verður á aftur, men hesaferð er ikki nóg væl farið um, sigur Hjarnar Djurhuus.

Nú er tangin á Tvøroyri tømdur, og nýtt blýfrítt bensin er aftur at fáa.

Stjórin á Shell sigur, at teir bilar, sum hava havt trupulleikar av óhappinum, kunnu ókeypis fáa skift oljuna á bilunum.

**Dagny**

**Kvíga**

Kálvar í mars – til sølu.

**Tlf. 32040 ella 33121**

**Íbúð ynskist**

Par við tveimum børnum søkir íbúð í Havn fyri max. 1.200 kr. um mðr.

Skriva til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn, undir

**Bill. mrk. 2062**

**Barna- og ungdómstelefonin**

**hjá Barnabata/Reyða Krossi svarar mánadag frá kl. 16–18. Tlf. 10645.**

*Press & Journal heldur glið er komið á marknasamráðingarnar*

# Danir og bretar loysa upp fyri marknaósemju

Oljukeldan, Conival, sum BP fann í fjør, og sum møguliga eisini er inni á føroyskum øki, er helst av so stórum týdningi fyri bretska oljuvinnu, at bretska stjórnin og danskir myndugleikar vilja gera alt fyri at fáa glið á ella finna eina loysn á marknaósemjuni longu tíðliga í næsta ár.

Hetta er ein av høvuðssøgunum í skotska blaðnum »Press & Journal« nú dagin fyri at oljumessan í Aberdeen skal lata upp. Blaðið, sum hevur gjørt seg út til serliga at viðgera orkumál, hevur fleiri ferðir rakt í blett, tá tað hevur »gitt« um nýggjar oljukeldur vestan fyri Hetland annað.

Tað var tíðindamaðurin hjá blaðnum, Geremy Cresswell, sum í fjør á fyrstu stóru oljuráðstevnuni um nýggju økini vestan fyri Hetland rættuliga gjørdi hart, tá hann tvørtur um alla forsíðuna kundi siga frá, at BP hevði funnið eina nýggja, risastóra oljukeldu skamt frá føroyska fiskimarkinum, ja, so nær, at BP varð tvingað til at halda tíðindini loynilig, meðan samráðingarnar millum londini um markið hildu fram.

Nú spøkir Conival aftur. Í útgávuni mánadagin skrivar blaðið, at hóast oljukeldur sum Foinaven, Schihallion, Clair og aðrar hava vakt áns vestan fyri Hetland, so tekur eingin Conival nærhendis føroyska markinum.

Blaðið skrivar, at »a provisional continental shelf boundary agreement between Westminister and Copenhagen, which is negotiating behalf of the Faroese, could in place early next year«.

Blaðið hevur frá keldu fingið at vita, at sambandið millum stjórnirnar í Bretlandi og Danmark, tí tær báðar halda tað hevur alstóran týdning í hvussu so er at loysa upp fyri samráðingunum, soleiðis at ein ella onnur semja kann gerast, har oljufeløg sleppa at gera kanningar í teimum mest áhugaverdu økjunum, sum júst eru tey umstriddu.

BP sigur annars við blaðið, at tíðin er enn ikki komin til at avdúka nakað um Conival. Hetta verður lagt út sum at BP vil ikki seta nakran kíla í samráðingarnar.

Føroysk og donsk umboð fyri samráðingarnevndina eru í Aberdeen. Tey hava ongar viðmerkingar til tíðindini í skotska blaðnum, annað enn at samráðingarnar halda fram sum higartil og at næsti fundur verður 21. september í London.

Hotel Føroyar

Tlf. 17500
Hotellið við útsýninum

**HUGNAKVØLD**

**FRÍGGJAKVØLDIÐ 8. SEPTEMBER KL. 19.00**

Til matna verður:

- Klársuppa við bollum
- Gamaldags oksasteik
- Kaffi og smákøkur

**Kostnaður fyri hvønn:**
**KR.100,-**



*Heri Joensen, prestur í Vági, ættaður úr Svínoy, sigur frá søgum úr Suðuroy, Svínoy og Íslandi, har hann hevur lokið próg sum prestur*

*Altíð vælkomin á*

Hotel Føroyar ★★★★
Tlf. 17500

Bílegging á tlf. 17500